LØGTINGIÐ

**Flaggdagsrøða í Norrøna húsinum í Reykjavík**

**Løgtingsformaðurin**

27.04.2026

Góðu føroyingar, góðu íslendsku vinir okra og góðu sangbrøður í Tórshavnar Manskóri og makar.

Í dag, 25. apríl, hátíðarhalda okur flaggdagin.
Tað er við eini heilt serligari kenslu at standa júst her hendan hátíðardag. Í einum landi, sum altíð hevur staðið okum føroyingum serliga nær. Og tá okur nú hátíðarhalda flaggið, so eisini júst tí landinum og saman við teimum fólkunum, ið mugu sigast vóru tey fyrstu at viðurkenna okra flagg, væl áðrenn tað formelt varð viðurkent.
Okur eru tvey fólk og tvær tjóðir, sum eru serliga tætt knýtt av felagssøgu og felags virðum. Okur deila harumframt eina felags virðing fyri tí fría og sjálvstøðuga valinum, sum okur eru so heppin at hava í okra parti av heiminum. Nakað, sum okur ikki skulu taka fyri givið, men harafturímóti virðismeta og vera takksom fyri.

Okur skulu meir enn 100 ár aftur í tíðina fyri at lesa og hoyra um upprunan til okra flagg: Merkið. Ávirkaðir av tjóðarromantiska tíðarandanum og við íblástri frá júst íslendskum studentum birtist hugskotið til Merkið.
Merkið veittraði fyrstu ferð í Keypmannahavn – og tað vóru júst íslendingar, ið møttir vóru til hesa løtu, sum fagnaðu føroyska Merkinum við dundrandi hurrárópum.

Fyri meg er hesin dagurin ikki bert søguligur. Hann er eisini persónligur.
Eg eri uppvaksin í bygdini Fámjin, har okra fyrsta flagg so vakurt hongur, sum ein heilagur lutur á vegginum í kirkjuni.
Á sumri í 1919 kom blaðungi skyldmaður mín, Jens Olivur Lisberg, til bygdina við flagginum í skjáttuni. Jens Olivur hevur áður greitt frá, hvussu serliga bergtikin hann var hendan vakra summardag, hann kom til landið, tá hann í havsbrúnni hómaði vøkru oyggjarnar.
Í heimi sínum Vesturi á Fløtti hevði hann flaggið á stong, fyrstu ferð í Føroyum.
Tá eg var smádrongur, hugdi eg ofta upp móti kvistvindeyganum í heiminum hjá Jens Olivuri uttan veruliga at geva mær far um søguliga týdningin, hetta húsið og hesin unglingi hevði fyri okra land.
Tað er ikki frítt, at eg í dag eri bæði errin og kenslusamur, tá eg hugsi um

ferðina, ið Merkið hevur ferðast: úr Keypmannahavn, har tað bleiv sniðgivið og føtt, til lítla kvistvindeygað í Fámjin og haðani út til øll heimsins lond.

Hóast Merkið veittraði fyrstu ferð í 1919, var tað ikki fyrr enn í 1940, at tað formliga varð viðurkent. Hesi árini kom tað í fleiri førum til skarpskeringar ímillum ymiskar partar, tá talan var um Merkið. Alla tíðina hava okur tó kent stuðulin frá íslendsku vinum okra.
Eitt dømi er frá 1000-ára hátíðarhaldinum fyri stovnsetingina av Althinginum á sumri í 1930. Umboðandi Føroyar luttók løgtingsformaðurin, Edward Mitens. Løgtingsformaðurin hevði tá eisini orðið og bar íslendingum eina heilsan frá føroyingum. Spurdur, hvørjum flaggi hann skuldi tosa undir, tá tosað varð, svaraði hann Merkinum. Og hesi blivu vundin á stong. Hetta hóvaði tó ikki øllum, og tí vóru íslendingar kroystir og kendu seg noyddar at taka Merkið niðuraftur.

Flaggið er okra felags hjartasláttur. Tað er ein fylgisveinur, ið ongantíð svíkur.
Okur vinda tað á stong, tá okur hátíðarhalda rundar dagar, brúðarvígslur, barnadóp og ítróttarsigrar. Okur veittra við tí á vøllinum, tá okur sum ein lítil tjóð bjóða teimum stóru av.Tá kennist Merkið sum ein sigur í sjálvum sær. Okur kenna eisini øll tyngdina, tá flaggið er á hálvari stong. Tá verður Merkið okra felags uggi. Tað savnar okum í tøgn í sorgini og sigur: “okur hava samkenslu og eru her fyri hvønn annan.”

Merkið er meir enn bara eitt plagg. Tað er okra samleiki. Millum onnur heimsins fløgg. Tað kennist heilt serligt at síggja Merkið veittra millum onnur heimsins fløgg.
Her í Íslandi, lið við lið við íslendska flaggið, verður tað sjónligt, at okur eru partur av einum størri felagsskapi. Í norðurlendskum høpi er tað fjálgt at síggja, at øll 8 vøkru norðurlendsku fløggini veittra lið við lið, og vísa okra samanhald sum lond.
Tá okur ferðast úti í heimi og síggja okra flagg, rættist ryggurin eitt sindur meir. Okur føla okum sædd og hoyrd. Hetta minnir okum eisini á, at hvat okur so enn gera, og hvar okur enn eru – um okur eru løgtingsfólk, sjófólk, verkafólk, lesandi ella sangarar – so bera okur eina tjóð á herðunum.

Í dag er Tórshavnar Manskór komið higar at heiðra 100-ára hald Karlakór Reykjavíkur og syngja saman.
Sangurin hevur, júst sum flaggið, evni at binda fólk saman. Tá okur syngja saman, og tá okur síggja fløggini, lið við lið, minkar fjarstøðan.
Hóast okur í dag eru stødd í Reykjavík, so føla okur okum heima, tí okur hava Merkið og hvønn annan.
Latið okum tí halda flaggdagin við dýrum minnum um tey, ið gingu undan, og við vónríkum eygum móti framtíðini.
Latið okum vera stolt av okra uppruna – hvørt okur so koma úr Fámjin ella búgva her í Íslandi. Tí í hjartanum bera okur fosturland okra, óansæð hvar í heiminum okur eru stødd.

Góðan flaggdag øll somul!

Takk fyri !

Johan Dahl
løgtingsformaður